MEST
Fjøruvegur
FO-620 Runavík

Argir hin 16. apríl 2014
Málsnr.: 14/00011-19
Málsviðgeri: Lena Ziskason

# umhvørvisgóðkenning

# MEST, Runavík




| | |
|---|---|
| **Virki:** | **MEST, Runavík** |
| **Adressa:** | **Fjøruvegur, 620 Runavík** |
| **Matr. nr.:** | **95** |
| **Virksemi:** | **Smiðja** |

# 1 Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

# 2 Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av virkseminum hjá MEST í Runavík, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Henda góðkenning kemur ístaðin fyri umhvørvisgóðkenning av smiðjubygningi hjá P/F F.J.M. í Runavík, mál nr. 611-200200763-14, dagfest 26. mai 2003.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 3 Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk 7. januar 2014 umsókn frá MEST, har søkt verður um at dagføra umhvørvisgóðkenningina fyri smiðjuvirksemið hjá MEST.

Undir viðgerðini av umsóknini og í samband við at áseta treytir er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Upprunaumsókn frá P/F F.J.M., HS mál 611-200200763
- Branchevejledning frá aug. 2013: *Jern- og metal maskinværksteder*
- Vejledning fra Miljøstyrelsen: *Begrænsning af luftforurening fra virksomheder, der udsender svejserøg, nr. 13, 1997*
- Faktaark 1.i6: Jern- og metalbranchen

## 3.1 Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, havi og jørð,
- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at óljóð og útlát av dusti verður avmarkað mest møguligt,
- at umhvørvisliga besta tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær skal minkast mest møguligt,
- at virkið áhaldandi arbeiðir fyri at skifta evni, sum kunnu vera dálkandi, út við meira umhvørvisvinarlig evni,

[1] **Best Available Techniques**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent MEST og Runavíkar kommunu.

MEST hevði viðmerking til treyt til at avkast frá útsúgving av sveisiroyki skal førast í minsta lagi 1 m yvir tak. Umhvørvisstovan hevur tikið hetta til eftirtektar og broytt treytina.

Runavíkar kommuna hevði ongar viðmerkingar.

### 3.2 Lýsing av virkseminum

Virksemið umfatar virksemið sum er á matr. nr. 95 á havnarlagnum í Runavík.




Sambært byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu er talan um vinnuøki D1 – D4, sum er ætlað til havnarendamál ella líknandi vinnuvirksemi.

Virksemið, sum er knýtt at smiðjubygningin, er goymsla og framleiðsla av ymiskum lutum úr rustfríum stáli. Talan er um framleiðsluútgerð til verksmiðjur, flakalinjur, transportbond og annað. MEST hevur upplýst, at tey nýta TIG sveisiháttin og sveisa áleið 6000 tímar um ári.

## 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Virksemið hevur við sær útleiðing av sveisiroyki frá verkstaðnum. Frá sveising kemur m.a. roykur, sum inniheldur partiklar, ið kunnu vera til ampa í nærumhvørvinum. Útleiðingin hevur sjálvreinsandi filtur. Dust, sum verður afturhildið í filtrinum, skal latast sum vandamikið burturkast.
Tá jarn og stál verður sveisað, kunnu dálkandi evni leiðast út. MEST hevur upplýst, at tey einans nýta TIG-sveisiháttin. Tá hesin hátturin verður nýttur, er næstan ongin roykur og einans ozon verður útleitt. Við hesi nøgd av ozon, er tað ikki dálkandi fyri umhvørvið og tí verður ikki mett neyðugt at føra avkast 1 m yvir tak. Tó verður treyt sett til MEST, at um annar sveisiháttur verður nýttur ella ampar verða av royki, skal MEST føra útleiðingina í minsta lagi 1 m yvir tak.

Ávísar nøgdir av máling og øðrum evnum eru á goymsluni hjá MEST í Runavík. Hesi skulu goymast soleiðis, at tey í mest møguligan mun ikki elva til dálking. Treyt verður eisini sett til, at MEST áhaldandi roynir at skifta skaðilig evni út við heilsu- og umhvørvisvinaligari evni.

Virksemið kann geva nakað av óljóði frá tilevning av stáltilfari. Treytir verða tí settar fyri óljóð.

MEST hevur eitt øki omanfyri bygningin, har m.a. burturkast sum skal latast til endurnýtslu, verður goymt. Treyt verður sett til, at hetta goymsluøkið verður væl skipað og hildið reint og ruddiligt.

Alt burturkast skal skiljast sambært galdandi reglum og latast umhvørvisgóðkendum móttakara.

Mett verður ikki, at núverandi virksemið leiðir dálkað spillivatn út. Treyt verður tó sett til MEST, at um spillivatn ella regnvatn frá goymsluøkinum omanfyri bygningin vísir seg at verða dálkað, so skal MEST gera neyðuga reinsing, áðrenn tað verður leitt út.

## 5 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

### 5.1 Almennar treytir

5.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

5.1.2 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

5.1.3 MEST hevur ábyrgdina av øllum útláti, dálking, óljóði o.ø..

5.1.4 Allar sýnistøkur, kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.

5.1.5 Allar sýnistøkur, kanningar, metingar av úrslitum og metingar annars verða goldnar av MEST.

5.1.6 Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn Umhvørvisstovan hevur góðkent víðkanina ella broytingina.

5.1.7 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

5.1.8 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkennignin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

5.1.9 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

### 5.2 Innrætting, goymslur og virksemi

5.2.1 Virksemið skal rekast sambært góðkenningartreytunum.

5.2.2 Økið, sum hoyra til virkið, skulu haldast rein og ruddilig.

5.2.3 MEST skal tryggja, at umhvørvisdálkandi evni verða goymd soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

5.2.4 Økið omanfyri smiðjubygningin skal hava fast og tætt undirlag og skal vera væl skipað og altíð hava nóg mikið av hóskandi bingjum ella íløtum til tilfar og burturkast, sum verður savnað á økinum.

5.2.5 Onki frárenningarvatn má bera brá av olju ella aðrari dálking.

5.2.6 Nýtsla av reinsievnum skal avmarkast mest møguligt.

5.2.7 Miðast skal eftir at nýta mest umhvørvisvinaligu máling og reinsievnum.

## 5.3 Útlát til luft

5.3.1 Virksemið má ikki hava ampar við sær av royki, lukti ella dusti uttanfyri øki virkisins.

5.3.2 Úleiðing av sveisiroyki skal hava neyðuga reinsing, so sum filtur.

5.3.3 Um mett neyðugt kann Umhvørvsisstovan krevja at avkast frá útsúgving av sveisiroyki skal førast í minsta lagi 1 m yvir tak.

5.3.4 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

5.3.5 Um neyðugt kann Umhvørvisstovan krevja at MEST ger kanningar av luftútlátinum, tó í mesta lagi eina ferð um árið.

## 5.4 Burturkast

5.4.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2], og skal latast umhvørvisgóðkendum móttakara.

5.4.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egna til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

5.4.3 Goymslur við burturkasti skulu tømast regluliga so tær ikki gerast ov stórar.

5.4.4 Umhvørvisstovan kann krevja váttan frá MEST, sum vísur nøgd, slag og hvar ávíst burturkast er latið.

## 5.5 Óljóð

5.5.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum uttan fyri øki virkisins.

5.5.2 Óljóð[3] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | **mán – frí kl. 07 – 18<br>leyg. Kl. 07 - 14** | **mán – frí kl. 18 – 22<br>leyg. kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22** | **Allar dagar<br>kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð 35 dB frá virkseminum.

5.5.3 Um ampar verða av óljóði, skal MEST gera neyðug tiltøk setast í verk.

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007
[3] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 5.6 Sýnistøkur og kanningar

5.6.1 Umhvørvisstovan kann krevja at MEST ger kanningar av royki, spillivatni og óljóði.

5.6.2 Markvirðið fyri innihaldi av dusti í útlátinum skal í mesta lagi vera 20 mg av dusti pr. $m^3$.

5.6.3 Markvirðið fyri innihaldi av mineralskari olju í spillivatninum skal í mesta lagi vera 10 mg/l.

## 5.7 Óhapp

5.7.1 Har vandi er fyri spilli av kemiskum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

5.7.2 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.

5.7.3 Óhapp, sum hava dálking við sær, skulu fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

## 5.8 Umhvørvisstýring

5.8.1 Virkið skal hava fasta mannagongd fyri viðlíkahald av reinsiskipanini á útsúgvingini.

5.8.2 Virkið skal áhaldandi arbeiða fram ímóti at nýta tey mest umhvørvisvinaligu kemisku evnini.

## 5.9 Rakstarskráseting/Umhvørvisfrágreiðing

5.9.1 MEST skal skráseta hesar upplýsingar:

- Viðlíkahald av reinsiskipanini á útsúgvingini,
- Nøgd av burturkasti og stáli til endurnýtslu, tilskilað slag og hvønn tað er latið til,
- Rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning,
- Møgulig kanningarúrslit,
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi,

5.9.2 Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum, og skulu goymast í minasta lagi 5 ár.

5.9.3 MEST skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing, sum inniheldur omanfyri nevndu skrásetingar, saman við møguligum kanningarúrslitum. Somuleiðis skal frágreiðingin innihalda frágreiðing um gjørd og ætlað umhvørvistiltøk.

5.9.4 Umhvørvisfrágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi ári.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

# 6 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Suni Petersen, deildarleiðari / Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Runavíkar Kommuna, Heiðavegur 26, FO-600 Saltangará
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn